# Óli Samró á seminari: Ger tað n

**- Fiskiskipaflotin hevur ikki í nóg stóran tillagað seg til broyttar umstøður, men nú oljuprísurin er øktur so nógv, hava nótaskipini tillagað seg við eitt nú at partrola eftir norðhavssild – bæði, tí tey fáa størri nøgdir við partroli og tí, at tey spara olju, segði Óli Samró á seminarinum, "Oljuprísir – enn ein avbjóðing", sum Farec skipaði fyri**

SEMINAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag skipaði ráðgevingarfelagið Farec fyri seminari í útvarpshøllini um oljuprísir undir heitinum, "Oljuprísir – enn ein avbjóðing".

Tað vóru búskaparfrøðingarnir, Óli Samró, sum stendur aftanfyri Farec, Teitur Poulsen, sum starvast hjá Faroe Petroleum og Magni Laksafoss, sum starvast við Fróðskaparsetur Føroya, ið viðgjørdu spurningin, hvussu oljuprísirnir kunnu ávirka fiskivinnuna og føroyska búskapin komandi árini.



*Á seminarinum, "Oljuprísirnir – enn ein avbjóðing", smá-provokeraði Óli Samró teir, sum varða av fiskiflotanum við at spyrja, um tað ger nakað, um skipini liggja eina tíð, um raksturin ikki ber seg*

Mynd: Jens Kr. Vang



*Á seminarinum gjørdi Teitur Poulsen, búskaparfrøðingur (Faroe Petroleum), eina køna meting av gongdini í oljuprísunum í komandi tíðum. Hetta fara vit at venda aftur til í komandi blaði*

Mynd: Jens Kr. Vang

### Hvussu hongur "lívið" saman?

Óli Samró vísti til áhugaverda bók, hann hevur lisið hjá norska prestinum, Jan Kjærstad, sum setir spurningin: "Hvordan hænger et liv sammen"?

Hann helt fyri, tá ið hann vísti til fiskiflotan og hækkandi oljuprísirnar, at ofta verður tikið fatt um viðurskifti, sum vit einki kunnu gera við, meðan tað, vit kunnu gera nakað við, ikki verður nortið.

Hann reisti eisini spurningin, hvat tað merkir fyri fiskiflotan, um oljuprísurin fer upp við eini krónu, samstundis sum fiskaprísurin fer upp við eini krónu.

- Tað er ikki bara oljuprísurin, sum hevur sína ávirkan á skiparakstur.

Óli ásannaði, at prísurin, sum skipini fáa fyri fiskin, hevur verið eitt niðurgangandi "trend", sum hann tók til, samstundis sum oljuprísurin er eitt uppgangandi "trend".

Sostatt venda bæði hesi "trend" skeivan veg, og skipini fáa ikki hesa einu krónuna meira fyri kilo, sum kundi byrgt upp fyri hækkandi oljuprísinum.

Óli vísti á eina talvu, hann hevur gjørt við fimm skipabólkum, sum vísir, at hækkandi oljuprísurin serliga gongur útyvir raksturin hjá djúpvatnstolarum og partrolarum, meðan prísirnir hava minni ávirkan á raksturin hjá eitt nú flakatrolarum og línuskipum, har manningin í størri mun luttekur í oljuútreiðslunum.

### Tillaging neyðug

Hann helt ikki, at fiskiskipaflotin í nóg stóran mun hevur tillagað seg til broyttar umstøður, men vísti kortini á, at nú oljuprísurin er øktur so nógv, hava nóta-

# Pensjónistar í Nes kommunu fáa

**Um stutta tíð letur dagtilhald fyri eldri upp í eldrasambýlinum, Vesturskini á Toftum. Leiðari er settur fyri tilhaldið, og tað er Elin Dahl Kastalag av Glyvrum**

DAGTILHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri skipaði Kvinnufelagið á Toftum, har Jansy Olsen er formaður, fyri fundi við evninum: "Hvussu varðveita vit lívsvirðið, tá ið vit eldast"?

Eini 80 fólk møttu til upplýsandi fundin, og hetta var nógv meira, enn fyrireikararnir høvdu droymt um.



*Stórur áhugi var fyri fundinum á Toftum herfyri, sum Kvinnufelagið skipaði fyri. Heitið á fundinum var: "Hvussu varðveita vit lívsvirðið, tá ið vit eldast"?*

### Góður fundur

Av Toftum verður sagt, at hetta var ein ógvuliga góður og ikki sørt stuttligur fundur – ein fundur bæði til gamans og álvara.

Tey, sum høvdu framløgurnar, vóru Katrin Dahl, sum er pensjónerað sjúkrasystir og fyrrverandi býráðslimur í Havn, Vanja Petersen, sjúkrasystir og leiðari fyri Tilhaldinum í Havn og Sofus Joensen, sálarlækni.

Jansy Olsen hevði eisini ymiskt at bera fram, og tað høvdu onnur, sum vóru við á fundinum, eisini.

Tórður Mikkelsen, sum er toftamaður og tíðindamaður, var orðstýrari, og tað var ikki sørt, at hann hevði onkra "góða" at fortelja inn ímillum framløgur og hugnaligt prát um viðurskiftini hjá teimum eldru og gomlu.

### Dagtilhald

Ynski hevur verið um at skipa fyri einum dagtilhaldi, nú Nes kommuna eigur snotuligt eldrasambýli, og tað er ikki minst Kvinnufelagið á Toftum, sum hevur slóðað fyri ætlanini.

Tað eru soleiðis Nes kommuna og Kvinnufelagið í felag, standa aftanfyri dagtilhalið, sum verður fíggjað við peningi, ið tað almenna letur til forsorgararbeiði.

Elin D. Kastalag, leiðari fyri tilhaldinum, sigur, at almennur fundur verður um tilhaldið á Vesturskini, 27. sepbember klokkan 16, og ætlanin er, at tilhaldið letur upp fyri pensjónistum í Nes kommunu klokkan 14 dagin eftir, nevniliga mikudagin 28. september.

Ætlandi verður tilhaldið opið hvønn dag frá klokkan 14 til 18.

# akað, um skipini liggja eina tíð?

skipini tillagað seg við eitt nú at partrola eftir norðhavssild – bæði, tí tey fáa størri nøgdir við partroli og tí, at tey spara olju.

Á seminarinum, sum Farec skipaði fyri, vóru eisini umboð fyri vinnufeløgini, og millum hesi var eitt nú Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag.

Tá ið Óli Samró reisti spurningin, um tað ger nakað, um skip liggja eina tíð, um raksturin ikki hongur saman, fekst í lag kjak um hesi viðurskifti.

- Er tað nakað problem, um skipið verður lagt eina tíð? spurdi hann.

Jákup Sólstein helt, at tað nyttar lítið at tosa um eina krónu upp á fiskaprísin, tá ið hon ikki er har – og prísirnir í staðin eru lækkaðir munandi.

- Tað veldst eisini um, hvønn veiðibólk vit tosa um. Fingu partrolararnir, sum fiska upsa, eina krónu meira upp á prísin, hevði tað havt stóran týdning, tí nøgdirnar av upsa eru so stórar, samstundis sum prísirnir eru so lágir.



*Umboð fyri vinnuna vóru við á seminarinum, og tey fylgdu við áhuga framløgunum um útlitini um oljuprísirnar*

Mynd: Jens Kr. Vang



*- Nótaskipini og Havsbrún í Fuglafirði hava tillagað seg broyttu umstøðurnar, segði Óli Samró*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Nógv kann gerast

Óli Samró helt, at tað eru nógv viðurskifti, sum teir, ið reka skipini, kunnu ávirka – ikki minst við størri umsetiligheit.

Hann endurtók, at bæði pelagiski flotin og virkið Havsbrún í Fuglafirði eru áhugaverd dømir um, at hesin parturin av flotanum og virkisliðnum hevur tillagað seg broyttu umstøðurnar.

- Virkið er útbygt og tillagað í fleiri ár, segði hann.

Óli Samró reisti eisini spurningin, um hýruprosentini neyðturviliga skulu vera tey, tey eru, har manningin í eitt nú línuflotanum fær upp ímóti eini 60%.

- Hýruprosentini við eitt nú norsku rækjuskipum hava verið munandi lægri enn í Føroyum. Kortini hava norskir rækjumenn tjent meira enn teir føroysku – og í dag er rækjuvinnan hjá okkum at kalla burtur.

Óli vísti eisini á, at hansara royndir eru, at útreiðsurnar av fiskiflotanum veksa við aldrinum á skipinum.

- Hvussu nógvar rationellar "handlingar" hava vit sæð í føroyska fiskiskipaflotanum seinastu árini? spurdi hann.

Einki bendir á, at hækkandi oljuprísir merkja, at fiskaprísurin hækkar.

- Eg haldi ikki, at søgan sigur okkum, at samanhangur er millum høgar oljuprísir og høgar fiskaprísir.

Á seminarinum vísti Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur á, at samanhangur ikki er millum hesi viðurskifti.

- Eg trúgvi ikki, at Unilever fer at rinda meira fyri fiskavørur, hóast oljuprísurin er høgur, segði Óli Samró.

## Hugburðsbroyting

Hann helt eisini, at neyðugt er við eini hugburðsbroyting í føroyskari fiskivinnu, har størri dentur verður lagdur á tað, sum veiðiliðið kann gera nakað við - heldur enn at brúka nógva tíð upp á tað, sum einki kann gerast við.

- Oljuprísurin í Føroyum og Noregi er hin sami, men gongdin er ikki hin sama, segði Óli Samró, sum vegna Farec skipaði fyri seminarinum, "Oljuprísir – enn ein avbjóðing".

# nú dagtilhald

- Mín uppgáva verður at skapa karmarnar um og at hjálpa teimum eldru og gomlu at realisera síni ynskir.

## Sjálvsábyrgd

Elin D. Kastalag sigur, at ætlanin er at hava fastar skráir fyri hvønn dagin, soleiðis at fólk vita, hvat er á skránni, tá ið tey koma í tilhaldið.

- Enn er ikki alt komið upp á pláss, men vit fara at skipa fyri eitt nú fyrilestrum ella frásøgu, fimleiki, sangi og øðrum ítrivstiltøkum. Ætlanin er eisini at útvega okkum einar tvær teldur, har tey eldri og gomlu kunnu verða við í "ættarpráti" og møguliga lesa tíðindi.

Leiðarin, sum sjálv hevur verið á tilhaldinum í Havn nakrar dagar og kunnað seg um, hvat tey gera har, heldur tað vera umráðandi, at tey, sum koma í tilhaldið á Toftum, hava eina nokso stóra sjálvsábyrgd av tí innihaldi, sum tilhaldið verður karmur um.

- Tað var sera áhugvera at síggja, hvat tey gera í Havn, og eg haldi, at Vanja Petersen er ein sera dugnaligur leiðari, sigur hon.

## Gott tiltak

Anna Jacobsen, sum er dagligur leiðari á eldrasambýlinum á Toftum, heldur, at hugskotið við tilhaldinum er gott.

- Vit hava góðar umstøður til eitt slíkt tilhald við stórum veitsluhøli í kjallaranum, stórum køki og tveimum øðrum rúmum, sum kunnu nýtast til endamálið. Eisini eru wc'ir og brúsumøguleikar tøkir í niðaru hæddini.

Hon heldur ikki, at eitt slíkt tilhald fer at taka nakað frá eldrasambýlinum.

- Nei, eg trúgvi ikki, at tað verður øvut, tí fólk, sum búgva á eldrasambýlinum, kunnu eisini fáa nakað burtur úr, at skipað verður fyri tiltøkum fyri pensjónistum, sum ikki búgva á sambýlinum.

Anna Jacobsen heldur, at fólk, sum ikki eru pensjónistar, saktanst kunnu hjálpa til við at aktivera tey, sum eru eldri.

- Vit fegnast um, at tilhald nú verður í húsinum, og vit ivast onga løtu í, at hetta kemur at seta uppaftur meira lív í húsið, sigur leiðarin.

## Trý í nevnd

Nes kommuna hevur havt eina skjóttarbeiðandi nevnd sitandi, sum hevur arbeitt við einum tilhaldi, og í nevndini hava sitið; Petur í Túni (fyri kommununa), Anna Jacobsen (fyri eldrasambýlið) og Jansy Olsen (fyri kvinnufelagið).



*Julius býr á eldrasambýlinum, og Richard Wenzel er óførur at vitja*

## UTTAN ÚR HEIMI

### Væntar semju um Barentshavið

Í mong ár hava norðmenn og russar verið ósamdir um, hvussu teir skulu býta Barentshavið og ikki minst undirgrundina sínamillum, men nú sigur russiski tilfeingismálaráðharrin, at hann væntar eina skjóta semju um málið.

- Eg vænti, at vit kunnu fáa eina semju við norðmenn um eitt hálvt ár ella so, segði Juri Trutnev á einari frálandaráðstevnu í Sk. Pætursborg.

Í summar samdust stjórnirnar í Oslo og Moskva um at taka samráðingarnar um býtið uppaftur, eftir at tær hava ligið stillar í fleiri ár. Í veruleikanum hava londini verið samd um at lata málið liggja, og tí er at kalla einki hent tey seinastu umleið 30 árini, skrivar Nordlys.

Teir tríggir flokkarnir, sum nú samráðast um at skipa stjórn í Noregi, hava sagt, at teir fara at leggja størri dent á at fáa greiði á viðurskiftunum í Barentshavinum. Tað kemst ikki minst av tí ovurhonds stóra oljuríkidøminum í økinum.

### Kann skriva søgu

Eydnast tað javnaðarkvinnuni Helen Clark at skipa stjórn í Ný Sælandi, skrivar hon søgu, tí so er hon tann fyrsti javnaðarpolitikarin har síðani seinna heimsbardaga, sum er stjórnarleiðari í trý valskeið á rað.

Val var í Ný Sælandi seinasta vikuskiftið. Arbeiðaraflokkurin hjá Helen Clark fekk 40,7 prosent av atkvøðunum og tann borgarligi andstøðuflokkurin 39,6 prosent, so í tinginum er bara eitt umboð á muni millum flokkarnar. Arbeiðaraflokkurin hevur stýrt sum minnilutastjórn tey seinastu árini og ætlar at halda fram, men tað krevur, at hann fær stuðul frá einum av hinum flokkunum.

Nógv bendir á, at tað verður tann nýggi flokkurin hjá ný sælendska upprunafólkinum, sum fer at tryggja stjórnini hjá Helen Clark tann neyðuga meirilutan. Maorarnir, sum upprunafólkið eitur, gjørdu av at stovna egnan flokk fyri at fáa størri lut í framburðinum í samfelagnum. Eitt nú er arbeiðsloysið munandi størri ímillum upprunafólkið enn tað hvíta fólkið, og tey hava heldur ikki somu útbúgvingar sum meirilutin av fólkinum.

### Vandsmikil mýggjabiti

Asiatiskir heilsumyndugleikar vilja vera við, at meiri enn 1.000 fólk eru deyð av einari sjúku, sum tey fingu, eftir at mýggjabitar høvdu bitið tey. Í Nepal hava myndugleikarnir staðfest, at har eru minst 271 fólk deyð av sjúkuni, og í India er talið 783.

Talan er um eitt slag av heilabruna, sum elvir til nógvan fepur, krampa og spýggju. Sjúkan tók seg av álvara upp fyri einum hálvum ári síðani. Hon stavar frá svínum, og tað eru mýggjabitar, sum bera hana við sær og smitta fólk. Tað ber væl til at viðgera fólk ímóti sjúkuni, men trupulleikin er, at sjúkrahúsini eru ov illa útgjørd, og harafturat hava tí ov lítið av heilivági, skrivar AP.

Tað eru serliga børn, sum fáa sjúkuna. Soleiðis er eisini í India, men sambært heilsumálaráðharranum í landspartinum Uttar Pradesh hevði tað verið alt ov dýrt at koppsett øll børnini har ímóti sjúkuni. Tað hevði kostað einar 350 milliónir krónur, og tað er tríggjar ferðir meiri, enn landsparturin brúkar til heilsumál um árið, skrivar AP.

### Stillar ikki upp

Tá tann kendi danski sjónvarpsmaðurin Claus Borre fyrr í ár fór úr starvinum í Danmarks Radio, segði hann, at hann hevði gjørt av at stilla upp fyri flokkin Vinstra í Keypmannahavn á kommunuvalinum í november. Men tað verður av ongum.

Sambært Politiken hevði Claus Borre biðið flokkin um hjálp til at heingja valplakatir upp, men svarið var nei. Tað vil tann 60 ára gamli Borre ikki góðtaka, og hann heldur mannagongdina hjá flokkinum vera løgna.

- Fyrst biðja tey meg stilla upp. So kravdu tey, at eg skuldi gjalda 15.000 krónur fyri plakatirnar. Nú krevja tey, at eg sum 60 ára gamal skal klúgva upp í ljóssteyrarnar við plakatunum, men tað geri eg ikki. Tí havi eg gjørt av at sleppa uppstillingini, sigur ein misnøgdur Claus Borre við Politiken.



*Mynd: Reuters*

# So er tað »Rita«

**Bara tríggjar vikur eftir at ódnin "Katrina" oyðilegði stór øki í amerikonsku suðurstatunum, er tann næsta á veg. Hon kann gerast líka ring**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann stóri spurningurin er, hvussu nógv "Rita" fer at versna, nú hon er á veg tvørtur um Meksikanska Flógvan, har sjógvurin er rættiliga heitur.

Eins og "Rita" bar "Katrina" fyrst við Florida, men tá var hon ein av teimum veiku ódnunum. Uppi yvir Meksikanska Flógvanum menti hon seg til eina av teimum hørðu ódnunum og elvdi til ta størstu náttúruvanlukkuna í nýggjari amerikanskari søgu. Minst 973 fólk lótu lív, og fólk í tíggjutúsundatali í statunum Louisiana, Mississippi og Alabama mistu hús og heim. 80 prosent av býnum New Orleans stóð undir í vatni, og fólk eru ikki sloppin til hús enn.

- Vit kunnu ikki siga, at "Rita" er eitt avrit av "Katrinu", men tær líkjast nógv, og munurin er ikki stórur, segði Frank Lapore á amerikonsku veðurstovuni í gjár.

Enn duga teir amerikonsku serfrøðingarnir ikki at siga, hvussu ring "Rita" verður, og hvar hon fer at koma inn yvir land. Tær flestu útrokningarnar vísa kortini, at hon verður í flokki trý, tá hon verður miðskeiðis í Meksikanska Flógvanum, men aðrar útrokningar siga, at hon verður í flokki fýra.

Tað er ikki óhugsandi, at hon fer at bera við land á New Orleans-leiðini, men tað er mest sannlíkt, at hon fer inn yvir land í Texas. Ein útrokning vísir, at hon helst fer í land við býin Houston, har 273.000 fólk búgva, og sum júst nú hýsir fleiri túsund av teimum, sum vórðu flutt úr New Orleans. Houston er oljubýur og kann verða sera meint raktur, tí ódnin verður helst upp á tað ringasta, tá hon kemur hagar, siga veðurmenninir.

Býarmyndugleikarnir í New Orleans ætlaðu at lata fólk sleppa at flyta heimaftur hesa vikuna, men George W. Bush, forseti, segði nei.

- Vit mugu síggja veruleikan í eyguni, sjálvt um tað sær út til, at "Rita" fer í land longri vesturi enn "Katrina". Í øllum førum er vandi fyri, at hon kann elva til nýggja vatnflóð í New Orleans, og tað noyðast vit at taka til eftirtektar, segði Bush mánadagin.

# Aftur bardagar í Darfur

**Bardagarnir eru kyknaðir aftur, samstundis sum partarnir sita við samráðingarborðið**

SUDAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Júst sum tekin vóru um frið í tí borgarakrígsherjaða sudanska landspartinum Darfur frættist frá hørðum bardøgum ímillum uppreistrarherin SLM og sudanskar stjórnarherin.

Leiðslan í SLM kunngjørdi í gjár, at uppreistrarmenn hava tikið valdið í einum býi, og at minst 80 stjórnarhermenn lógu eftirá. Herleiðslan í Khartoum váttaði seinni tíðindini, men vildi ikki siga, hvussu nógvir hermenn vóru falnir.

Annars vóru útlit fyri friði í Darfur, eftir at partarnir herfyri samdust um at fara til samráðingarborðið. Samráðingarnar eru í Nigeria, men mánadagin hóttu uppreistrarmenninir við at rýma, tí teir vildu vera við, at stjórnarherurin hevði lopið á fleiri øki, sum uppreistrarmenninir hava valdið í. Teir játtaðu kortini at halda fram við samráðingunum, eftir at teir høvdu fingið vissu fyri, at Afrikanski Eindarfelagsskapurin skuldi kanna, hvat veruliga var hent. Summar keldur halda, at tað eru partar av uppreistrarherinum, sum hava tikið vápn í hendi fyri at forkoma friðarsamráðingunum.

Borgarakríggið í Suðursudan hevur kostað nógv túsund mannalív, og sivilfólkið hevur liðið nógv undir krígnum. Fleiri túsund eru deyð, og fleiri hundraðtúsund eru flýdd frá húsi og heimi.